## Skulu ikki noyðast at dúva upp á tann góða viljan



Innlendismálaráðið fer fyrsta dagin at seta kunnerð í gildi, sum skal beina tær forðingar burtur, sum gera, at fólk við breki, ikki kunnu ferðast frítt í samfelangum, sigur Ráðið fyri brekað í tíðindaskrivi. - Men so leingi henda regla ikki er sett í gildi, er umráðandi, at fyriskiparar hugsa um atkomuviðurskiftini í síni heild, leggur Ráðið afturat. Annars staðfestir ráðið, at hásummar er, og nógv forvitnislig tiltøk eru at fara til. - Øll eiga at fáa høvi at luttaka, og soleiðis kunna vera ein virkin partur av øllum tí, sum verður bjóðað. Jú betri viðurskiftini eru, tess fleiri kunnu luttaka. - Hetta er ikki minst galdandi, nú festivalar og stevnur eru fyri framman, og nógvir gestir vitja land okkara. Ráðið fyri brekað sigur, at málið er at bróta forðingar niður, so blind, sjónveik, deyv, rørslutarnaði og onnur sleppa at luttaka á jøvnum føti. Ráðið fyri brekað heitir tí á fyriskiparar og onnur um at taka hædd fyri, at møguleiki er hjá øllum at luttaka.

# Ákærdur fyri kynsligan ágang og barnaporno

**Føroya rættur er í dag farin undir at viðgera eitt revsimál, har ein maður er ákærdur fyri at hava gjørt seg kynsliga inn á eina smágentu og at hava tikið niður barnaporno av netinum**

RÆTTARMÁL

*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Siðamisbrot móti børnum verða altíð viðgjørd í rættinum fyri afturlatnum hurðum, og so er eisini við einum umfarandi máli, ið Føroya rættur í morgun fór undir at viðgera.



*Tann ákærdi maðurin hevði tikið niður barnapornigrafiskar myndir av netinum. Myndirnar fekk politiið hendur á*

*Modellmynd*

Tveir heilir dagar eru settir av til málið.

Tað er ein 43 ára gamal maður, sum er ákærdur.

Sambært ákæruritinum gjørdi hann seg kynsliga inn á eina gentu, sum í 2007 var fýra ára gomul.

Haraftrat er hann ákærdur fyri at hava tikið videomyndir og aðrar barnapornografiskar myndir av internetinum. Tær myndirnar hevði maðurin í varðveitslu, tá ið hann varð handtikin.

Bæði verjin hjá manninum og ákærin bóðu í morgun um at fáa hurðarnar latnar aftur, og tað gjørdi dómarin, eftir at ákæruritið varð lisið upp.

Tá ið tann ákæri maðurin er avhoyrdur, skulu nøkur vitni hoyrast. Vitnini eru mamman at smágentuni, tvær døtur hjá manninum og ein politistur.

Haraftat skulu avspælast videoupptøkur av avhoyringunum av børnunum.

Ákærin krevur fongsulsrevsing og endurgjald.

Tann ákærdi maðurin noktar seg sekan í báðum ákærunum.

# Tættari samstarv tvørtur um Leirvíksfjørð

**Kommunurnar í Norðoyggjum og nakrar kommunur í Eysturoy hava sett hol á prátið um tættari samstarv. Tey hava enntá nevnt møguleikin fyri kommunusamanlegging tvørtur um Leirvíksfjørð**

SAMSTARV

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Nú halda politisku lokalfeløgini í Norðoyggjum, at stundin er komin at jarða flokspolitisku stríðsøksina og heldur virka fyri samstarvi og samvinnu.

Tí kallaðu tey herfyri borgarstjórunum í Norðoyggjum, umframt borgarstjóranum í Fuglafirði og í Eysturkommunu á fund at tosa um samstarv.

- Á fundinum tosaðu vit í víðastu merking um kommunalt samstarv og eisini um at leggja kommunur saman, sigur Gunvá við Keldu, borgarstjóri í Klaksvík.

Hon sigur, at sjálvandi vóru meiningarnar ógvuliga ymiskar.

Men kortini heldur hon, at talan var um ein góðan fund, tí fleiri hildu, at tað verður neyðugt við tættari samstarvi ímillum kommunurnar.

- Møguleikin var eisini nevndur um at leggja kommunur saman tvørtur um Leirvíksfjørð og her var tað serliga ímillum Klaksvíkar kommunu og Eysturkommunu, hugsað varð um.

Ført varð fram, at soleiðis kundu vit fingið eitt uppaftur størri øki, sum kundi megna nógv meiri enn vit gera hvør sær sum er.

Hinvegin hevur borgarstjórin í Fuglafirði ikki verið serliga hugaður fyri samanlegging.

Kortini heldur Gunvá við Keldu, at spurningurin um tættari samstarv og samanlegging, er eitt mál, sum skal búnast.

### Neyðugt við samstarvi

Sjálv heldur hon, at tað verður meiri og meiri nátúrligt við meiri málrætaðum og skipaðum samstarvi, serliga tí at yngru ættarliðini hava ógvuliga lætt við at flyta seg.

- Sjálv ivist eg ikki í, at sum frálíður verður so tungar byrðar lagdar á kommunurnar, at tað verður vónleyst hjá hvørji einstakari kommunu at hava hvør sítt fullfíggjað tænastutilboð.

- Tí haldi eg, at tað í minsta lagi verður neyðugt at samstarva, so at ávís tilboð eru á einum staði og onnur tilboð so eru á einum øðrum staði.

- Annars fáa kommunurnar ikki ráð til at gera íløgur og verður ikki ráð til at byggja økini út, fara tey at doyggja so spakiliga, sigur Gunvá við Keldu.

- Tí verða vit noydd til at síggja økini í einum størri høpi, tí tað verður vónleyst hjá hvørji einastu kommunu at byggja seg fult út við skúlum, barnagørðum, ellisheimum og øllum øðrum tænastum.

Eitt samstarv, sum tosað varð um at skipa í størri høpi, var sløkkiliðið.

Annars staðfestir Gunvá við keldu, at onki ítøkiligt kom burtur úr fundinum hesuferð, men semja er um at taka hittast aftur eftir summarfrítíðina.

- Hetta eru alt viðurskifti, sum krevja tíð at verða viðgjørd og at búnast áðrenn nakað kann spyrjast burtur úr.



*Borgarstjórin í Klaksvík er sannførd um, at tað verða lagdar so tungar fíggjarligar byrðar á kommunurnar, at tað verður neyðugt at hugsa í nógv størri økjum*

- Vit eru greið yvir, at fyrr ella seinni verða fleiri kommunur lagdar saman og so er tað betri, at kommunurnar eru til reiðar og sjálvi hava lagt ymisk viðurskifti til rættis, tá ið harraboðini koma.